Finnbogi Arge, formaður í fíggjarnevndini:

– Eg fari ikki frá

Nýggja støðan hjá tingmanninum hevur í sær, at sambandsflokkurin ikki hevur umboðan í fíggjarnevndini. Tí tekur Finnbogi Arge tað sum givið, at hinir í samgonguni umboða sambandsflokkin í fíggjarnevndini

Tá Sosialurin ringdi til Finnboga Arge í gjár, sat hann júst og skrivaði Føroya Væl aftursvar upp á áheitanin um at fara úr tinginum.

- Eg fari ikki frá, sigur Finnbogi Arge.

- Hvørjar grundgevingar hevur tú at bera fyrrverandi valfelag tínum?

- Eg havi ongar grundgevingar. Tað sigur seg sjálvt. Atkvøðurnar eru persónligar, og tí ikki ogn hjá sambandsflokkinum, sigur Finnbogi Arge.

- Ikki tí, eg rokni við at sambandsflokkurin veit at eg eigi sessin, høast samgongan av míni avgerð viknar. Tað er sjálvandi harmiligt, men eg haldi ikki, at hon viknar so nógv, at tað er ein meinbogi fyri arbeiðið í tinginum.

Virða tingarbeiðið

- Vit eru framvegis 17 í samgonguni, og eg kenni meg ikki sum orsøkina til slitið, og havi tí eisini virðing fyri tingarbeiðnum, sigur Finnbogi Arge.

Fríggjadagin var fundur í formansskapinum, har spurningurin um framtíðar virksemið hjá Finnboga Arge var til viðgerðar.

Formansskapurin kom til ta niðurstøðu, at tað ikki tykemur honum at velja nevndirnar av nýggjum, orsakað av, at tingsamansetingin er broytt.

Um einstaklingar, tingbólkar ella flokkar biðja um at nevndirnar verða valdar av nýggjum, fer formansskapurin at ganga áheitanini á møti.

- Um eingin biður um tað, heldur arbeiðið fram, bert við tí broyting, at sambandsflokkurin ikki hevur umboðan í fíggjarnevndini, sigur Finnbogi Arge.

Formaðurin í fíggjarnevndini roknar tó við, at samgongan fer at umboða sambandsflokkin í nevndini.

Fíggjarnevndin arbeiðir í løtuni við fíggjarlógaruppskotinum, og hetta arbeiðið heldur fram sum vanligt. Í løtuni fer viðgerðin av tølunum fram, og biðið verður um nærri upplýsingar og vitan, fyri at gera tað ítøkiliga arbeiðið, sum skal til.

Eftir hetta verður tann politiska viðgerðin av fíggjarlógini, og har er tað spurningurin, hvussu tann viðgerðin verður, tá ein partur av samgonguni stendur uttan fyri fíggjarnevndina.

- Tá henda vikan er av, er fíggjarnevndin liðug við útreiðslusíðina, og fer undir viðgerð av inntøkusíðuni av fíggjarlógini, og so verður álitið skrivað, sigur Finnbogi Arge.

Finnbogi Arge er frameftir formaður í fíggjarnevndini. Hann sigur við Sosialin um viðgerðina av fíggjarlógini í nevndini, at nakrar hækkingar eru rimiligar, meðan aðrar eru í so stórar. M.a. hevur Eilif Samuelsen, landsstýrismaður í skúlamálum, biðið um 10 mió. krónur hækking. Hetta hevur Finnbogi Arge áður sagt seg ikki stuðla



Mynd: Kaimar

Tað verður ein serstøk støða í tinginum, tá fíggjarlógin skal til viðgerðar, av tí at samansetingin í fíggjarnevndini ikki avspeglast í samansetingini í tinginum.

- *Er vandi ikki fyri, at arbeiðið steðgar upp?*

- Eg gangi bert út frá, at teir í samgonguni, sum eru limir í fíggjarnevndini, eisini umboða sambandsflokkin. Treytin er bert, at tað arbeiðið skal gerast uttan fyri fíggjarnevndina.

- Møguliga er fíggjarlógaruppskotið treytað av nývali av nevndum, men fyribils arbeiða vit sum ætlað sigur Finnbogi Arge.

Dagny

Niels Nattestad, formaður í Føroya Væl:

Vit kunnu ikki krevja Finnboga frá

Áheitanin til fráfarna sambandsmannin gevur ikki væntaða úrslitið. Finnbogi Arge verður sitandi í tinginum og er frameftir formaður í fíggjarnevndini, um eingin bólkur, flokkur ella einstaklingur á tingi, vil hava hann frá

Formaðurin í Føroya Væl hevur ikki hoyrt frá Finnboga Arge, sum í vikuskiftunum fekk bræv frá felagnum um at siga seg frá í tinginum, so 8. maðurin á sambandslistanum kundi sleppa framat.

– Vit hava einki frætt, og vit kunnu heldur einki krevja. Nú mugu politikararnir í flokkinum taka sær av málinum, sigur Niels Nattestad.

Hann leggur aftrat, at brævið var bert ein roynd at fáa Finnboga Arge at taka seg úr tinginum, so 8. maðurin hjá flokkinum kundi varðveitast.

– Sum nú er fáa vit einki gjørt. Orsøkin til at vit skrivaðu brævið var, at vit vónaðu at fáa Finnboga Arge í talu. Tað miseydnaðist - størri vald hava vit ikki, sigur Niels Nattestad.

Í brævinum til Finnboga Arge skrivar felagið um gongdina í samstarvinum við fráfarna sambandsmannin, sum ikki altið hevur verið samdur við flokksfeløgum sínum. M.a. vildi hann ikki góðtaka samgonguskjalið og gjørdi vart við hetta í valfelagnum. Hetta varð tó fingið upp á pláss, og Finnbogi Arge segði á limafundi í Føroya Væl, at nú skuldi felagið ikki fáa fleiri trupulleikar av honum.

Friðurin vardi 3'tt ár

"Nú er eitt árum liðið, og tað hendir aftur, at tú ikki kanst góðtaka tað, ið ein meirluti í flokkinum er samdur um", skrivar Niels Nattestad.

Formaðurin í valfelagnum heldur, at tað er ein erlig sak, tá Finnboði Arge sigur, at bert ein trupulleiki er í flokkinum, og at hann eitur Edmund Joensen. Tó hevur felagið at Finnboga Arge, at hann ikki hevur eitt vet av floksanda í sær, tí tað hevði verið ein fyrimunur.

Tað verður eisini fýlst á, at fráfarni sambandsmaðurin ongantíð hevur vent sær til felag sítt, í sambandi við ósemjuna, sum gjørdi, at Finnbogi Arge tók seg úr flokkinum. Bert eitt telefax tann dagin, tá hetta hendi, kom til felagsskrivstovuna.

Ger flokkinum ónáðir

Sambandsflokkurin heitir tí á Finnboga Arge, nú bert sjey tinglimir eru fyri sambandsflokkin, um at víkja sæti, so flokkurin aftur fær 8. tingmannin.

"Hvørja ávirkan tú fært sum leysgangari á tingi, vita vit ikki, men sambandsflokkinum og sambandsveljarum gert tú ónaðir", skrivar valfelagið.

Hóast hetta, so fegnast Føroya Væl, at Finnbogi Arge framvegis sigur seg vera sambandsmann, og heitir tí inniliga á hann um at gera flokkinum og tingbólkinum tann beina, at taka seg heilt úr tinginum og geva pláss fyri sambandsumboði, sum ger føroysku stjórnanina tryggari.

Dagny



Tórshavn 16. november 1995

Herra Finnbogi Arge, stjóri
Hánusargøtu 7
100 Tórshavn

Á løgtingsvalinum í juli 1994 vórðu valdi 3 fólk á listanum hjá sambandsflokkinum í Suðurstreymoy. Ein teirra var tú.
Eftir tøgvið stríð varð samgonga skipað við Sambandsflokkinum á odda. Sjálvur vart tú ikki nøgdur við samansetingina av teimum flokkum, ið mannaðu stýrið í Tinganesi. Men eftir eitt skifti, har ið tað tykist sum tú ala ikki fór at góðtaka samgonguna yvirhøvur, so gjørdi tú tó av at taka undir við samgonguskjalinum, og vit góðtóku eisini, at tú gjørdi vart við, at tú ikki vart fullnøgdur. Sjálvur hevði tú ikki tikið lut í samgongusamráðingunum, tí tú vart staddur uttanlands. Tó segði tú á limafundi í Føroya Væl, at nú skuldi veljarafelagið ikki fáa fleiri trupulleikar av tær.

Hetta er gott er sláan. Men nú hendir tað eftur, at tú ikki kanst góðtaka tað, ið ein meirluti í flokkinum er samdur um. Tú gert eisini vart við tað aliment. Ósemjan millum teg og løgmann og formann Sambandsflokslins gerst nú so stór, at tú velur at taka avleiðingarnar og sigur teg úr tingbólki flokslins. Tú boðar somuleiðis frá í fjølmiðlunum, at tú framvegis ert sambandsmaður og tekur undir við tí, ið flokkurin stendur fyri. Men tú ásannar, at fyri teg er ein trupulleiki, og hann eitur Edmund Joensen. Hetta dylur tú heldur ikki fyri fjølmiðlunum. Slíkt er ein erlig søk, og vit kunnu ikki krevja av tær, at tú skalt hava ta elju ta meiningina, men eitt sindur meira av floksæga hevði verið ein fyrimunur fyri flokkin.

Ongantíð setti tú teg í samband við feleg tátt, heldur ikki vildi tú á fund við okkum, so at vit kundu sleppa at hoyra teg sjálvan greiða frá tí. Ið hent var í útvarpinum tysmorgunin 14. nov. fraaltu vit so, at tú hevði meldað teg úr Føroya Væl. Seinni sama dag fekk felagið telefax við somu boðum.

Vit hermast um tað, sum fram er farið og halda ikki, at hetta tænir landinum til frama. Hetta eru trupler tíðir, vit liva í, og sum eisini varð fert fram undan seinasta val, so ráddi um at fáa ein stabilt og tygt stýri úti í Tinganesi.
Hesin tryggleiki er nógv viknaður, nú Sambandsflokkurin er minkaður niður í 7 tinglimir. Sambandsveljarar valdu 8 fólk á ting, men bert 7 stýðja samgonguna, sum Sambandsflokkurin stendur á oddi fyri.
Hvørja ávirkan tú fært sum leysgangari á tingi, vita vit ikki, men Sambandsflokkinum og sambandsveljarum gert tú stórar ónáðir.

Tú ert framvegis sambandsmaður, hevur tú sagt aliment flein ferðir, og tað er at fegnast um. Tí fara vit inniliga at heita á teg, um at gera flokkinum og tingbólkinum tann beina, at tú tekur teg heilt úr tinginum fyri at gera pláss fyri einum sambandsumboði, sum ger føroysku stjórnina tryggari.

Vónandi kemur tú til ta niðurstøðu, at tú á tann hátt tænir Føroyum og tí fólki, ið býr her, best.

Við beztu kvøðjum
v. Føroya Væl
Niels Nattestad
form.

BILLUTIR
útvegast til
FLEST
ALLAR
Fa. BILLUTIR
Tlf. 21605 Fax. 21666